

*"Sæl er tó fjøldin hin blinda,*
*ið sorgleys sum óviti fer,*
*men grim tykist skapningsins lagna*
*honum, ið gløggur er"*
*- Úr sanginum 'Ei svarar úr loyndardýpi'*

*"Tó neyðar mannabørn siga:*
*algóði Gud setti os her*
*til æviga dýrd at vinna;*
*tað látur- og grátuligt er."*
*- Úr sanginum 'Ei svarar úr loyndardýpi'*

*"Hví skaptust ótaldar milliardir*
*til pínslu og heljarstríð?*
*Ei svarar úr loyndardýpi,*
*um vit spyrja æviga: hví."*
*- Úr sanginum 'Ei svarar úr loyndardýpi'*

*"Mín sál hevur granskað og funnið*
*bert rúmdar kulda og tøgn,*
*kent gosið frá veldigum víddum,*
*sæð enda á lívsins søgn.*
*Eina eg kólnandi stardi*
*á tíðinnar vónleysa hav:*
*sum brestandi bløðrur í skúmi*
*søkk lívið og knøttur í kav."*
*- Úr sanginum 'Hørpuspælarin'*

*"Góða ongantíð fer tú úr huga*
*um eg fari so víða um verð,*
*nátt sum dag kann títt yndi eg skoða,*
*djúpt í hjarta tú avmyndað er.*
*Bjørt og vøkur var Venus hin væna,*
*tá hon, nýfødd, í brimhjómi vóð,*
*sveipt í sólgulli elskhugsgudinna,*
*fyri mær, tó tú bjartari stóð."*
*- Úr sanginum 'Góða ongantíð fer tú úr huga'*

Uni Holm Johannesen

Maðurin við síða og frísuta hárinum og stóra og gráa skegginum stendur og starir út í tóma luft eina løtu. Hann er horvin inn í sín egna hugaheim.

Bersøgni vísusangarin letur tónarnar, hann hevur framført, hanga stillisliga í luftini eina løtu.

Tað er fullkomiliga kvirt. Gravartøgn.

Tøgnin verður skjótt undarlig. Áhoyrarnir sita bara og gløða at manninum á pallinum. Tað er, sum tíðin steðgar eina løtu.

– Vegurin til heljar er torgreiddur, letur so brádliga úr djúpu og eyðmjúku røddini.

Hann er skjótur at leggja afturat, at tað er vegurin til himmals kanska eisini.

Ein lítið sannførandi látur hoyrist millum mongu áskoðararnar.

– Vegurin til himmals er breiðari, er ein áhoyrari knappur at svara aftur.

Maðurin á pallinum hyggur fram fyri seg. Hann hugsar seg um eina løtu.

– Javell, er stutta og lítið útgreinaða svarið.

Tað er byrjanin til eitt av hæddarpunktunum. Byrjanin til sangin 'Kom høvdingi frá Golgata,' sum, hóast meira rokkutur, verður framførdur eins meistarliga sum hinir.

## Risin aftur

Hanus G. Johansen hevur fingið fótin fyri seg aftur. Hann er risin aftur úr tunga sálarliga aldudalinum.

Tað bendi framførslan í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið í øllum førum á. Við stórum sjálvsáliti og sínari nærveru legði hann grundina fyri einari fantastiskari konsert, sum evnaríku tónleikasnillingarnir Benjamin Petersen, Magnus Johannesen, Mikael Blak og Kim Hansen, ið spældu undir, lyftu upp millum fremstu føroysku framførslurnar seinastu nógvu árini.

Tað eru bara gott og væl 10 mánaðir síðan, at Dimmalætting kom buldrandi á gøturnar við mynd av Hanusi G. Johansen á forsíðuni. Stóru og svørtu bókstavarnir staðfestu, at ein av okkara fremstu tónlistamonnum dugir illa at fáa sítt lív at virka. Hanus loysti frá posabandinum og segði frá, hvussu hann livdi í einum tungum sálarligum andróðri.

– Eg havi verið sera tunglyntur síðan síðst í november. Eg havi ikki brúk fyri hjálp! Eg havi brúk fyri onkrum at búgva í! Teir kunnu stinga hatta medisinið upp í reyvina, segði hann beint fram.

Hanus G. Johansen fekk sítt heilt stóra fólksliga gjøgnumbrot við útgávuni 'Gaman og Álvara í 1988'. Hann hevði smíðað løg til yrkingar hjá Poul F., sum skjótt vunnu honum serstøðu millum máttmestu tónaskaldini á føroyska tónleikapallinum.

Hann hevur verið frammi í stuttum millumbilum síðan, millum annað við Aldubáruni og yrkingum eftir norska skaldið Jakob Sande, umframt fleiri serstakar løtur á Summarfestivalinum.

Tað hevur stundum brotið upp um bæði sker hjá Hanusi hesi árini. Tónlistamaðurin, sum vaks upp í Klaksvík, hevur havt torført við at fáa tilveruna at hanga saman fíggjarliga. Hann segði í Refleksjón, mentanarsendingini í Kringvarpinum, at hann hevur havt 33 ymsar bústaðir seinastu 29 árini.

– Eg eri heilt forbannað troyttur av at skulu flyta allatíðina, staðfesti hann í sendingini.

Nú tykist sum, at hann hevur funnið fótafesti aftur. Við perlufløguni 'Hørpuspælarin – Hanus syngur Poul F.' prógvar hann sínar tónlistaligu gávur.

At føroyingar hava tikið til sín klaksvíkingin við serstøku útsjóndini sum fólkaogn, prógvaðu útgávukonsertirnar hesaferð.

Landsstýrisfólk, lærarar, arbeiðsleys, tónleikarar, skúlanæmingar, postboð, uppvaskarar og fleiri onnur sótu undir liðini á hvørjum øðrum og hvíldu í løtuni, meðan Hanus var á pallinum.

## Gloymdu seg burtur

Tað hevur verið lítið hugaligt at sitið og hugt at føroyska samfelagsmeldrinum seinastu mánaðirnar.

Sparingarnar á eldraøkinum, skrædlið hjá Eik Banka, rotinskapurin í miðfyrisitingini í sambandi við løggildu grannskoðararnar, uppsagnirnar á Faroe Seafood, vánaligu PISA-úrslitini og nógv annað hava sett dagsskránna.

Føroyski tjóðskaparsligi stoltleikin fær javnan ein undir vangan í hesum døgum.

Tað er hinvegin fleiri ferðir prógvað, at tað skal lítið til at savna lítlu tjóðina.

Tað var, sum gjørdi Hanus G. Johansen, og hinir á pallinum, ein heiðurligan manngarð um áhoyrararnar. Lívsins spurningar, illhugsarnir og óttin fyri komandi tíðum vóru kveistraður til viks í hálvan annan tíma.

Tú gloymdi deprimerandi tilveruna eina løtu.

Tað var kveikjandi at hoyra Hanus syngja mergjaðu yrkingarnar hjá sumbiarskaldinum.

Slíkar løtur festa av álvara í aftur tjóðskaparsligu glóðina og minnir okkum á, at Føroyar standa einki aftan fyri onnur á ymsum pallum.

Tað er alneyðugt at fáa staðfest, at vit duga, tí tíðindaflutningurin bendir ikki á tað í hesum døgum.

## Endiliga nýtt tilfar

Tað eru heili 22 ár síðan, at Hanus G. Johansen kom við fløguni 'Gaman og Álvara.'

Hóast føroyingar hava fagnað honum og trúliga sungið við á hansara framførslum síðan, so hevur hann verið lítið nýhugsandi og slóðbrótandi. Fólkini hava fingið tað, tey hava ynskt sær. Sangirnir 'Átjan', 'Saknur' og 'Á, kundi á tíðarhavi' hava verið fólkaogn. Føroyingar hava ongantíð fingið nóg mikið av Hanusi G. Johansen.

Orsøkin er helst, at hann hevur havt fáar framførslur, samanborið við fleiri aðrar tónleikarar og tónleikabólkar.

Tað er hinvegin upp á tíðina, at Hanus G. Johansen leggur nýggj løg afturat rúgvuni, og soleiðis verður aktuellur aftur.

Við nýggjum hvøssum uppgerðum við átrúnaðin, kærleikan og menniskjuni verða hansara komandi framførslur øðrvísi. Og tað ger einki.

## Hanus er Hanus

Framførslan nærkast endanum, tá Hanus steðgar á eina løtu og stillar guittarin.

Hann spælir nakrar tónar, skrúvar eitt sindur, og spælir so aftur.

Soleiðis heldur hann á í gott og væl 20 sekund.

– Ja, hatta var sangurin. Klappið bara nú, letur skemtiliga úr honum. Áhoyrarnir flenna í kíki.

Hanus er fullur í sjálválitið. Hann er stuttligur og álvarsamur á pallinum. Hanus er Hanus.

Hann hevur onga trongd at gera seg upp, hava fýrverk, dansarar og annað við á pallin fyri at ríka um løtuna.

Hanus undirheldur við sínum tónleiki og sjarmerandi lyndi. Og tað riggar hamrandi væl.

uni@sosialurin.fo